# Marorka Føroya




*Verkfrøðingarnir hjá Marorka Føroya Jóan Petur Petersen og Ólavur Simonsen vísa her fram radartøkni, ið verður brúkt til hæddarmátingar í skipanini*

**Marorka Føroya er ein nýstovnað føroysk fyritøka, sum íslendska fyritøkan Marorka og Lands-byggifelagið p/f hava sett á stovn. Eigaralutfallið er 50/50%**

Endamálið við Marorka Føroya er at granska, menna og selja orkusparandi tøkni til skip. Tøkniliga grundarlagið er ein orkusparandi skipan, sum íslendaska fyritøkan Marorka hevur ment. Hendan skipanin, sum verður kallað Maren, stýrir og avmarkar oljunýtsluna umborð á skipum.

Í løtuni starvast ein veikstreymsverkfrøðingur og ein verkfrøðingur í kunningartøkni á Marorka Føroya, og roknað verður við, at longu í heyst verður ein nýggjur maður settur í starv.

### Maren

Maren skipan er í høvuðsheitum ein skipan, sum boðar skipara, maskinmeistara og reiðara frá ovurnýtslu umborð, og hvussu og hvar sparast kann. Maren skipanin er lutvíst automatisk.

Flest allir skiparir og maskinmenn vita rættiliga væl, hvussu tað er møguligt at spara olju, men tað hevur verið ein mangul uppá greið virðir, fyri at kunna optimera orkunýtsluna mest møguligt, og her kemur Maren skipanin inn og vísir á við nágreiniligum tølum, hvat gerast kann fyri at optimera orkunýtsluna. Á summum økjum fer skipanin inn sjálv og stýrur fyri at lætta um hjá yvirmonnum, t.d. hvussu nógvar snúningar aksilin skal hava, og hvat hallið á skrúvuni skal verða fyri at fáa størsta framdrátt fyri minstu oljunýtsla. Skipanin er væl móttikin í Íslandi, og Marorka hevur eisini kundar í Hollandi, Kanada, Danmark og USA.

### Menning og gransking

Gransking og menning av hátøkni er týdningarmikil partur av nýggju fyritøkuni. 1. jan. varð ein granskingar/menningarverkætlan sett í gongd, ið kann gerast slóðbrótandi innan mátingar umborð á skipum. Verkætlanin er mett at takað 2½ ár. Endamálið við verkætlanini er at menna eina skipan, sum veitir skiparanum týdningarmiklar upplýsingar um aldu rundan um skipið, og hvussu skipið liggur í sjónum. Hetta verður gjørt við tillaga radartøkni, ið longu er tøk, soleiðis at hon kann brúkast til at máta frá skipinum niður á havyvirflatuna. Eisini er ætlanin, at gera eitt støddfrøðiligt modell av skipinum og hydrodynamikkinum rundan um skipið soleiðis, at tú alla tíðina hevur virðir fyri, hvussu mótstøðan er í sjónum.Verkætlanin kann sostatt býtast upp í tveir høvuðspartar. Fyrsti parturin fevnir um at gera mátingarnar av, hvussu skipið liggur í sjónum og at samantvinna hesar við aðrar mátingar sum t.d. snúningsferð, ferðøking og GPS-positión. Seinni parturin snýr seg um at gera eitt modell fyri hesi virðini, soleiðis at mótstøðan í sjónum kann roknast út. Nýggja skipanin skal kunna virka og seljast einsamøll, men skal eisini kunna leggjast afturat íslendsku Maren skipanini sum eitt modul.

Eitt av grundsjónarmiðunum við nýggju fyritøkuni er, at alneyðugt er við einum tøttum samstarvi millum vinnugransking og tað granskingar- og vitanarumhvørvi, sum annars er í landinum, skal granskingini í hátøkni verða lív lagað. Granskingar/menningarverkætlanin, sum er farin í gongd, verður gjørd í tøttum samstarvi við Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrið Føroya og Marorka í Íslandi.

### Marknaðurin

Marorka Føroya kemur at hava einkarrættin til at selja og installera Maren skipanina á føroyska marknaðinum. Tó er ikki óhugsandi, at Marorka Føroya í framtíðini eisini kann røkja aðrar marknaðir. Ognarrætturin til ta tøkni og tær skipanir, sum verða mentar í Marorka Føroya kemur at liggja í fyritøkuni, men verða seldar saman við Maren skipanini á øllum marknaðum gjøgnum sølunetið hjá Marorka. Marorka hevur longu skapt góðar kontaktir á heimsmarknaðinum, og tí er hetta ein sera góður møguleiki hjá Marorka Føroya at selja sína vøru.

### Máttarpeningur frá stuðlum

Innlendismálaráðið hevur játtað at stuðla við 100.000 kr. til at marknaðarføra verandi tøkni til tess at fáa gongd á at installera orkusparandi skipanir á føroyska marknaðinum.

Eisini hevur Stranferðslan víst vælvilja við at geva loyvi til at royndarkoyra ymiska radartøkni, sum skal brúkast í sambandi við Granskingar/menningarverkætlanina, umborð á Smyrli.

Verkætlanin er mett at kosta yvir 3. mió kr. og hevur fingið dyggan stuðul frá:

Granskingarráðnum 1.200.000 Kr.
Amerada Hess: 700.000 Kr.
Vinnuframagrunninum: 500.000 Kr.

# Eyðkennið hjá íslendska lambinum




*Gunnar Mohr, sølustjóri á Poul Michelsen, ið er umboð fyri Nordlendska í Føroyum*

Seyðahald er eins gamalt, sum sjálv búsetingin í Íslandi.

Íslendsk lomb verða lembd um várið og ganga alt summarið á biti høgt uppi í fjøllunum í tí frísku íslensku luftini. Lombini eru uttandura alt árið, og nátturliga føðin umfatar, umframt øll vanligu grassløgini, eisini mosa og ber.

Lambsframleiðslan er heilt einfalt grundað á at heysta burturav náttúrliga yvirskotinum. Íslenska veðrið, ódálkaða luftin og nokk av reinum fjallavatni ger, at tað er ikki neyðugt at nýta skaðakyktaeitur ella plantutýningargarevni. Takka verið landafrøðiligari avbyrging og strongu landbúnaðar reglugerðum, sum stýra influtninginum av livandi djórum, eru fleiri av vanligu djórasjúkunum enn ókendar í Íslandi.

Tessvegna er íslenskt lambskjøt heimskent fyri sermerkta smakkin og sum sera góður heilsukostur.

Norðlendska ehf. er ein framleiðslu- og marknaðarfyritøka innan landbúnað. Høvuðsframleiðslan er seyða- og lambsúrdráttir, oksa- og svínakjøt. Norðlendska er ein av fremstu fyritøkunum í Íslandi, sum útflytur seyða- og lambskjøt til høvuðsmarknaðirnar í Skandinavia og USA.

**Í Føroyum selur NORDLENSKA Íslenskt lambskjøt gjøgnum PM undir Goði Brand**